Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*15. februar 2021*

**UMMÆLISSKRIV**

***viðvíkjandi uppskotum til broytingar í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð og løgtingslóg um Búskaparráð.***

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (BLF) hevur fingið tvey uppskot til ummælis, ið snúgva seg um umskipan av Búskaparráðnum og broyting í nevndini fyri Landsbankan.

BLF mælir frá at leggja Búskaparráðið og nevndina fyri Landsbankan saman og hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

1. Við løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð varð ásett, at Búskaparráðið skuldi mannast við búskaparfrøðingum, ið hava kandidatútbúgving frá hægri lærustovni. Hetta varð gjørt fyri at tryggja neyðugu fakligu førleikarnar hjá ráðnum, samstundis sum talið á ráðslimum varð lækkað úr sjey niður í tríggjar limir, sbr. løgtingsmál nr. 132/2008.

   Við fyriliggjandi uppskotum verður talið av limum í Búskaparráðnum tað sama, men førleikarnir hjá ráðnum at røkja tað virksemið, sum er nevnt í § 1 í løgtingslóg um Búskaparráð verður munandi skert, tí at limirnir eisini skulu hava førleikar, sum eru viðkomandi fyri virksemið hjá Landsbankanum.

   Sambært § 2, stk. 3 í løgtingslógini um Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð, skulu limirnir í nevndini – sum eftir broytingina eisini verður Búskaparráð – samanlagt hava førleikar á øllum hesum økjunum: "búskaparfrøði, fígging og kredittmeting, serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum." Henda áseting er óbroytt við uppskotunum.

   Tá tað bert vera tríggir limir í nýggja samantvinnaða Landsbanka- og Búskaparráðnum, og tá limirnir skulu hava allar omanfyristandandi førleikar, er sannlíkt at bert ein av limunum í ráðnum verður búskaparfrøðingur. Avleiðingin verður, at tað ikki ber til at varðveita neyðuga fakliga grundarlagið undir Búskaparráðnum og førleikarnir at gera tær metingar, sum Búskaparráðið sambært § 1 í løgtingslóg um Búskaparráð er sett at gera. Broytingin máar

grundarlagið undan endamálinum við Búskaparráðnum og gagnar heldur ikki arbeiðinum hjá nevndini fyri Landsbankan.

BLF mælir tí frá, at sjálvstøðuga Búskaparráðið verður avtikið og lagt saman við Landsbankanevndini.

2. § 1 í løgtingslóg um Búskaparráð ásetur, at ráðið skal koma við óheftari búskaparligari ráðgeving, og verður henda áseting innihaldsliga óbroytt við uppskotinum. Óheftnið verður sambært galdandi løgtingslóg um Búskaparráð, og sambært løgtingslógini um Landsbankan og Føroya váðaráð, m.a. tryggjað við, at limir verða settir eftir *tilmæli* frá Fróðskaparsetri Føroya. Eisini er ásett, at limirnir í ráðnum ikki kunnu starvast í stjórnarráðunum ella á Setrinum.

   Verður broytingin samtykt, verður § 2, stk. 2 í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð soljóðandi:
   *"Stk. 2. Nevndin er skipað við 3 limum og 3 varalimum, sum landsstýrismaðurin velur í eitt 3 ára tíðarskeið og kunnu veljast aftur í mesta lagi 4 ferðir. Tá limur ikki hevur sitið í nevndini í eitt 3 ára skeið, kann hann veljast av nýggjum. Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Búskapar- og løgfrøðingafelagið, Felagið Føroyskir Grannskoðarar, ella onnur, sum landsstýrismaðurin heitir á, kunnu koma við uppskotum til nevndarlimir".* [BLF undirstriking].
   Samstundis verður § 2, stk. 4, ið er soljóðandi, strikað:
   *"Stk. 4. Um so er, at tey innstillaðu ikki hava ein nóg breiðan ella nøktandi fakligan førleika, kann landsstýrismaðurin biðja um nýggj tilmæli."*

   Sostatt verður mannagongdin broytt soleiðis, at landsstýrismaðurin frameftir bert tekur móti *uppskotum* og ikki *tilmælum*, tá nevndin fyri Landsbankan og Búskaparráðið skulu mannast. Fimm feløg og stovnar eru nevnd, umframt onnur, sum landsstýrismaðurin kann heita á, at koma við uppskotum til tríggjar nevndarlimir. Í viðmerkingunum er einki dømi um, hvørjar partar landsstýrismaðurin kann heita á og eingin frágreiðing um, hvussu hesi uppskot verða viðgjørd. Hetta tykist at vera í andsøgn við ásetingina um óheftni.

   BLF mælir til, at limirnir í óhefta Búskaparráðnum framhaldandi verða settir eftir tilmæli.

   Eisini er ógreitt sambært ásetingini, um nevndu stovnar og feløg skulu koma við uppskotum av sínum eintingum ella eftir áheitan frá landsstýrismanninum. Um ásetingin verður varðveitt, eigur hon at verða orðað greiðari.

3. Sambært almennu viðmerkingunum til uppskotið er endamálið at *"minka talið av nevndum og ráðum, og at rationalisera almennu fyrisitingina"*.

BLF metir ikki at vinningurin av samanlegging stendur mát við tann førleikamiss, sum broytingin fer at elva til. Tað er heldur eingin orsøk at broyta mannagongdina í sambandi við tilnevning av limum til nevndina í Landsbankanum og Búskaparráðnum fyri at røkka hesum endamálinum.

Vinarliga,

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya